Veljararnir stu›la sjálvst‡risleistinum

Baklandi› hjá Sjálvst‡risflokkinum samtykti á eykaa›alfundi um vikuskifti› at geva n‡ggju sjálvst‡risætlanini hjá landsst‡rinum fullan stu›ul

SJÁLVST†RIS-POLITIKKUR
John Johannessen

Baklandi› í sjálvst‡risflokkurin tekur fult undir vi› n‡ggja fullveldisleistinum, sum landsst‡ri › bo›a›i frá á tí›indafundi herfyri
Mynd: Jens Kr. Vang

Limirnir í Sjálvst‡risflokkinum vóru væl umbo›a›ir á eykaa›alfundinum, sum Sjálvst‡risflokkurin helt í Klaksvík leygardagin.

Á fundinum gjørdi flokkurin eina yvirl‡sing, sum fult tekur undir vi› n‡ggja sjálvst‡risleistinum, sum landsst‡ri› leg›i fram á tí›indafundinum 2. november.

Fundarsamtyktin vísir á, at ætlanin, sum Sjálvst‡risflokkurin leg›i fram saman vi› hinum samgonguflokkunum, tryggjar, at Føroyar gerast sjálvbjargnar og sjálvstø›ugar eftir einum realistiskum áramáli og at allar bindingar millum Føroyar og Danmark ver›a loystar eftir og vi› vilja Føroya fólks.

Sjálvst‡risflokkurin heldur n‡ggja sjálvst‡risleistin vera fult í trá› vi› stevnumi›ini hjá Sjálvst‡risflokkinum. Í yvirl‡singini sigur flokkurin seg meta n‡ggja leistin vera ein stig fyri stig politikk, sum vi› skilagó›ari fyriskipan førir á máli›, i› er einar frælsar Føroyar. Harafturat fegnast Sjálvst‡risflokkurin um, at verkætlanin skal sta›festast vi› tveimum fólkaatkvø›um.

– Sjálvst‡risflokkurin mi›ar eftir, at verkætlanin dær dyggan stu›ul millum manna á fólkaatkvø›uni, og tí kann fundurin als ikki taka undir vi› frábo›anunum um, at henda ætlan skal fremjast í einum ov stuttum tí›arskei›i, sigur Sjálvst‡risflokkurin at enda í fundarsamtyktini.

Broytir bygna›

Eykaa›alfundurin hjá Sjálvst‡risflokkinum vi›gjørdi eisini eitt uppskot um at broyta bygna› floksins, solei›is at ta› ver›ur sta›fest, at ta› er politiski forma›ur floksins, i› er talsma›urin úteftir.

Eftir skipanini higartil hevur Sjálvst‡risflokkurin havt ein formann í tingbólkinum og ein formann fyri landsnevndina. Forma›urin fyri landsnevndina hevur virka› sum forma›ur fyri baklandi›, me›an forma›urin í tingbólkinum hevur veri› politiskur forma›ur.

Hendan skipan hevur veri› heldur ørkymlandi, tí hon hevur skapt iva um, hvør er veruligi forma›ur floksins. Flokkurin og fólk yvirhøvur hava ivast í, hvør av hesum formonnum er tann, i› alment eigur at melda út vegna flokkin.

N‡ggja skipanin leggur upp til, at flokkurin framvegis skal hava ein politiskan formann og ein formann fyri landsnevndina. Men eftir n‡ggju skipanini skal ta› ver›a politiski forma›urin, i› er talsma›ur floksins úteftir. Forma›urin fyri landsnevdina skal taka sær av ymsum umsitingarligum uppgávum og samskipan.

Bá›ir formenninir ver›a valdir beinlei›is á hvørjum landsfundi.

Flokkurin samtykti á a›alfundinum, at lógaruppskoti› skuldi latast lokalfeløgunum til ummælis, so tey hava møguleikar fyri at gera broytingar í tí, á›renn ta› væntandi ver›ur samtykt á eykaa›alfundi í Havn einafer› tí›liga í desember.

Høgni fær umbering

Bla›stórin á l‡singabla›num, Hús & Heim, hevur sent Høgna Hoydal eina treytaleysa umbering fyri at hava prenta› eitt sera ærumei›andi dulnevnt lesarabræv um Høgna Hoydal og a›rar loyingarmenn

ÆRUMEI‹ING
John Johannessen

Høgni Hoydal fær treytaleysa umbering frá Jørgen Kristensen, bla›stjóra á l‡singabla›num, Hús & Heim.

Høgni Hoydal hevur sent bla›stjóranum á l‡singabla›num Hús & Heim krav um almenna umbering fyri dulnevnda lesarabrævi›, sum er prenta› í n‡ggjastu útgávuni av l‡singabla›num.

Lesarabrævi› er ógvuliga ærumei›andi móti Høgna Hoydal og ø›rum loysingamonnum. Lesarabrævi› fer enntá so miki› langt, at ta› setir Høgna Hoydal í samband vi› óndar maktir.

Jørgen Kristensen, bla›stjóri, sigur í umberingini, at brævi› kom honum í hendi stutt á›renn bla›i› fór til prentingar, og var› ta› tí av ósketni sett í.

– Hús & Heim, i› er eitt l‡singabla› burturav, er ikki heft politiskt ella átrúna›arliga. Sostatt átti hetta brævi› ikki at veri› sett í – serstakliga, tá hugsa› ver›ur um, at her ver›a bæ›i núlivandi og dey›ir persónar nevndir, millum anna› Høgni Hoydal, sigur Jørgen Kristensen í umberingini.

Bla›stjórin sigur seg veita Høgna Hoydal og ø›rum, sum kenna seg rakt av brævinum, eina treytaleysa umbering.

Fuglfir›ingar halda valfund

KOMMUNUVAL

Júst ein vika er nú eftir til kommunuvali›, og valstrí›i› er komi› í hæddina.

Í Fuglafir›i ver›ur í hesum samabandi skipa› fyri einum almennum valfundi, har umbo› fyri allar listarnar, i› stilla upp, ver›a vi›. Hetta er naka›, sum er vi› at ver›a eina gamal si›ur í Fuglafir›i.

Slíkir valfundir hava veri› hildnir undan nógvum teimum seinastu kommunuvalunum.

Valfundurin Fuglafir›i í ár ver›ur komandi hóskvøld.

F‡ra listar eru til kommunuvali› í Fuglafir›i. Teir eru Tjó›veldislistin, Javna›arlistin og tveir borgaralistar.

JJ

Løgma›ur heldur evnisdag

Mikudagin í næstu viku fer løgmansskrivstovan at halda evnisdag um starvsfólkapolitikk. Løgma›ur fer at rø›a um t‡dningin av slíkum politikki

STARVSFÓLKA-POLITIKKUR
John Johannessen

Hotel Føroyar ver›ur karmur, tá almennir lei›arar og starvsfólk mikudagin í næstu viku hittast til evnisdag um íverksetanina av almenna starvsfólkapolitikkinum.

Á evnisdegnum fara luttakararnir millun anna› at vi›gera, hvat skal til fyri at fáa almenna starvsfólkapolitikkin at virka, hvørjar møguleikar starvsfólkapolitikkurin gevur og hvørja ávirkan starvsfólkapolitikkurin kann fáa.

Dagurin byrjar vi›, at Anfinn Kallsberg, løgma›ur, grei›ir lei›arum og starvsfólkunum, sum arbei›a vi› starvsfólkavi›urskiftum frá t‡dninginum av at hava ein starvsfólkapolitikk fyri almennu arbei›splássini.

F‡ra framløgur eru afurat á evnisdegnum. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, fer at grei›a frá gongdini í starvsfólkapolitikkinum, Rúni Joensen, deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, fer at grei›a frá løgfrø›isligu stø›uni hjá starvsfólkapolitikkinum, Barbara á Tjaldrafløttt, deildarstjóri, fer at leggja fram lyklatøl úr frágrei›ingini um starvsfólkapolitikk og Helgi Rasmussen, vinnulívssálarfrø›ingur, fer at grei›a frá ymiskum vi›urskiftum í sambandi vi› íverksetanina av starvsfólkapolitikkinum.

Evnisdagurin endar vi›, at løgma›ur tekur samanum.

NÚ ER HON Á VEG!!!

PlayStation®2



Nýggja PS2 Playstation kemur skjótt til Føroyar. Og her er nógv nýtt og spennandi at síggja. Nýggja undirhaldsmaskinan kann, umframt at spæla PS2-spøl við ótrúligum grafikki og ferð, eisini spæla PS one spøl, CD-arar og DVD-filmar.

Um mánaðarskifti november/desember ber til at síggja PS2 í 3-aranum.

PS2-SPØL
CD
DVD
PSone-SPØL

PS one™ anywhere

- ER KOMIN FYRI AT VERA

Playstation v/joystick
kr. 1.295,-
LCD-skermur og telefon eru eykaútgerð

- heimsins best umtókta spælimaskina er nú vorðin minni, lættari og enn betri. Og í framtíðini fert tú, umframt at spæla sjálvandi, eisini at kunna taka niður frá internetinum, sama hvar tú ert. Ein ørgrynna av spennandi og avbjóðandi spølum eru at velja ímillum til PlayStation - og fleiri nýggj eru á veg...

3arin ELECTRONIC
SMS · Tel 353537 · Fax 353536
E-mail: electr@post.olivant.fo